Barnatiltakið Nósabarnaprix 2003

TÍÐINDASKRIV

So er tíðin komin til, at stóra Barnatiltakið Nósabarnaprix 2003 aftur er á skránni. Hópin av børnum hava teknaÝ seg til kappingina, og fara tey við sangið og framførslum at kappast um heiðurin at bera heitið „Vinnarin av Nósabarnaprix 2003".

Lagt verður til brots í KÍ-Høllini í Klaksvík, har fyrsta undanumfarið verður. Tiltakið byrjar kl. 19:00 og endar kl. 21:00. 10 luttakarar eru við, og onkur teirra hevur dansarar og/ella kór við sær á pallin, so spennandi verður hvussu børnini har norðuri fara at klára seg.

Aftur í ár hava sera nógv teknað seg, og áhugin tykist eins og í fjør at vera líka stórur. À plakatum og aðrastaðni verður lýst við at ein „spennandi gestur kemur á vitjan" so har verður nógv gott á skánni, bæði fyri børn og vaksin.

Nósabarnaprix 2003 er stuðlað av Føroya Banka, sum eisini letur gávulutir til áskoðararnar.

Kostnaðurin fyri eitt atgongumerki er kr. 100,- (børn undir skúlaaldur gjalda kr. 40,-).

Villblómudagur í Norðri 2003 sunnudag 15. juni

TÍÐINDASKRIV

Kom út í náttúruna og hygg at villum plantum sunnudagin hin 15. juni. Føroya Náttúrugripasavn skipar í ár fyri degnum. Túrurin gevur góðar møguleikar at fáa meira at vita um villan plantuvøkstur í Føroyum, og krevur ikki nakrar forkunnleikar til plantur.

Dagurin verður eisini hildin í Noregi, Svøríki, Grønlandi og Danmark har plantufrøðifeløgini skipa fyri. Stigtakari til dagin var tað danska plantufrøðifelagið, ið hevur hildið hendan dagin í 15 ár á rað.

Á 80 støðum í Danmark, 1 í Grønlandi, 210 í Svøríki, 80 í Noregi og 2 í Føroyum fara plantufrøðingar at greiða frá villum plantum, túrurin er fyri øll og er ókeypis.

Beint nú standa nógvar plantur í láglendinum í hægsta blóma, so góður møguleiki skuldi verið fyri at sæð ein hóp av plantum.

Ein túrur út náttúruni verður meiri áhugaverdur, jú meira tú veit um tað, ið tú sær. Veitst tú hvussu planturnar eita, eitt sindur um teirra livistøð, útbreiðslu, títtleika, lívfrøði, hvat tær hava verið nýttar til, og um tær kanska verða nýttar enn, meiri fært tú burtur úr einum túri í náttúrini. Alt hetta fært tú meira at vita um á villblómudegnum.

Tann eini túrurin verður á Tvøroyri og hin verður í Tórshavn. Um onkur heldur vildi farið út í plantufrøðiliga urtagarðin á Debesartrøð hjá Náttúrugripasavninum, verður fólk á staðnum, ið kann greiða frá tí, ið har veksur.

Samlaða skráin fer at liggja á heimasíðuni hjá Føroya Náttúrugripasavni www.ngs.fo

Meira upplýsingar um dagin kunnu fáast við at venda sær til Føroya Náttúrugripasavn á tlf. 352300.



Marknaðarrák

Lægstu rentur nakrantíð

Rentur	Renta	+/%-stig
Diskonto	2,00%	-0,50%
2 ralnsbr v	2,38%	-0,18%
5 ralnsbr v	2,94%	-0,22%
10 ralnsbr v	3,82%	-0,17%

Partabr vav ist¿l	Kursur	+/%
KFX, Danmark	213,7	1,3%
OMX, Sv¿rki	528,9	2,0%
DJStoxx 50, Evropa	2375,0	0,2%
S&P 500, USA	975,9	0,9%

Œl¿gufel¿g	Kursur	+/%
L nsbr¿v DKK	107,7	0,4%
EvruL nsbr¿v	168,5	0,4%
Norr¿n Partabr¿v	63,5	0,9%
Altj ¶a Partabr¿v	67,3	0,9%

Gjaldoyra	Kursur	+/%
USD	633,70	0,4%
EUR	742,61	0,0%
GBP	1042,26	0,9%
NOK	90,74	-3,6%

Renta og kursirkl10 gjr Broytingareru trokna¶ar mun tilfyrivikus ¶an.

Sum væntað, og sum umrøtt í seinasta marknaðarráki, vóru leiðandi renturnar í Evropa og Danmark lækkaðar í farnu viku. Bæði evropiski miðbankin og danski tjóðbankin avgjørdu at lækka leiðandi renturnar við 0,50%-stigum. Danska diskontoin er nú 2,00% og hetta er lægsta stig í útvið 200 ár. Rentulækkingarnar koma av, at stóru búskapirnir í Evropa eru í kreppu, og at evran samstundis er áleið á hægsta stigi, síðani evrusamstarvið varð sett í verk í 1999. Fyri at stimbra búskapirnir og forða fyri at negativa gongdin heldur áfram vóru nevndu stig tikin. Rentulækkingarnar koma at viðføra, at eisini føroysku peningastovnarnir fara at lækka teirra rentur.

Partabrøv hava sum heild staðið seg væl seinastu vikuna. Kortini hava tíðindir um, at amerikanska virðisbrævaeftirlitið er í ferð við at kanna roknskaparframferðina hjá IBM, havt ávirkan. IBM hevur sjálvt borðið tíðindini og avsannar, at nakað óregluligt er farið fram. Tíðindini hava tó merkt marknaðirnar, tí hesir hava verið bangnir um, at gølurnar frá seinasta summari fara at endurtaka seg. Kursurin á IBM er fallin um 10% síðani tíðindini vóru borðin. Tíðindini hava ikki havt stóra ávirkan á norðurlendsku partabrævamarknaðirnar.

Umframt tær leiðandi renturnar, eru eisini lánsbrævarentur á metlágum stigi í løtuni, og spurningur má tískil setast, um gongdin við lækkandi rentum fer at halda áfram. Viðvíkjandi leiðandi rentunum er sannlíkindi fyri enn lægri rentum, so leingi evran er á høga stiginum og so leingi greið tekin um betraða búskapargongd ikki eru tilstaðar. Lánsbrævarenturnar kunnu eisini lækka meira, men hesar eru um at náa markið, og tá tekin koma um at bjartari sær út í búskapunum, vilja hesar hækka aftur. Hetta verður to ikki fyrr enn eftir summarfrítíðina. Tískil eigur ein at vera varligur, tá lánsbrøv skulu keypast komandi tíðina.

Partabrævamarknaðirnir liggja framvegis á einum høgum stigi og roknast skal tí við, at partabrævaíleggjarar kunnu staðfesta vinning av teirra partabrøvum. Tískil kunnu marknaðirnir tíðum vera eitt sindur óstøðugir. Verður hugt eftir seinnu hálvu av 2003, kunnu marknaðirnir fara at standa seg hampuligt, men hetta er tengt at hvussu búskapirnir fara at roynast.

Vika 24, 2003
www.kaupthing.fo

ítróttur

Nr. 108 • hósdagur • 12. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Tá ið Lübeck var í Føroyum

Nú vitja týsku heimsstjørnurnar, men tað kendist eisini sum stórhending, tá ið týskt 2. deildarfelag vitjaði B36 fyri 36 árum síðani

TÝSKUR FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Í 1967 ella fyri 36 árum síðani hevði B36 ein týskan venjara, sum nevndist Walter Pfeifer. B36 spenti bogan høgt hetta árið, og teir ætlaðu at gerast meistarar. Tað eydnaðist teimum ikki, m. a. tí teir taptu báðar dystirnar ímóti KÍ – 3–1 í Klaksvík og 3–2 í Gundadali. KÍ vann meistaraheitið annað árið upp í slag. Tað var hetta liðið, sum seinni gjørdist hugtak undir heitinum 66 liðið.

Men hóast tað ikki eydnaðist hjá Pfeifer at gera B36 til meistarar, so syrgdi Pfeifer í hvussu so er fyri at seta ein varða eftir seg í Føroyum. Tað var vitjanin hjá VFB Lübeck. Við venjaranum sum millummanni varð týska felagið av B36 bjóðað henda vegin fyrst í juni, eftir at týska kappingarárið var av. Talan var um lið úr næstbestu týsku deildini.

Sambandið úr Føroyum og til stóra fótbóltsheimin var ikki nakað serligt, og einki sjónvarp var at fylgja stóru feløgunum í. Tí kendist tað, sum um tað so at siga vóru umboð fyri varaheimsmeistararnar (Vesturtýskland hevði árið frammanundan tapt tiltiknu HM finaluna á Wembley ímóti Onglandi), sum vóru komnir henda vegin.

Fíggjarliga var talan um ódnartak hjá B36, men tað segðist, at teir komu væl burturúr tí. Teir fingu bæði ÍSF og KÍ at hjálpa sær við útreiðslunum, tí Lübeck spældi umframt ímóti vertunum eisini ímóti landsliðnum, KÍ og býliðnum.

B36 tapti eitt regnkvøld í Gundadali 3–1. Landsliðið, sum fyrireikaði seg til heimadyst ímóti Hetlandi (vunnu 1–0) og tiltiknu ferðina til Íslands (taptu 2–1), spældi 7. juni venjingardyst ímóti Lübeck, sum vann 4–0.

Sunnudagin á norðoyastevnu var Lübeck í Klaksvík. Talan var um góðveðursdag av teimum heilt sjáldsomu. So nógvir áskoðarar vóru kring vøllin, sum tað neyvan høvdu verið frammanundan, og sum tað heilt sjáldan munnu hava verið síðani.

Lübeck vísti hugflogsríkt og ágangandi fótbóltsspæl, og teir vunnu 5–1. Lübeck málverjin hevði fingið ein snudd í Gundadali, og tí var Jørleif Kúrberg, sum um hesa tíðina kappaðist við Ólav Olsen um málverjuplássið hjá B36, málverji hjá teimum á norðoyastevnu.

Tey, sum sóu dystin í Klaksvík, eiga framvegis at komast við rimmar málið, sum KÍ fekk. Jákup Gerðalíð var ongantíð fastur maður á besta KÍ liðnum. Men henda dagin var hann við. Staddur eitt sindur frammanfyri miðjuna og eitt sindur til vinstru meddaði hann til, og bólturin fór beina kós aftur um Jørleif Kúrberg og upp í hornið í eystara málinum. Lübeck spældi eisini ímóti býliðnum, sum teir vunnu stórt á.

Týsku gestirnir í Føroyum í 1967 høvdu ikki heimsstjørnur á liðnum av tí slagnum, sum nú hava verið í Føroyum. Ein dani spældi við. Hann nevndist Erik Nielsen og var klókur miðvallari. Tað er ikki langt frá, at hann heimafturkomin til Danmarkar eftir yrkisskeiðið í Týsklandi, spældi við B1901 í Nykøbing Falster. Tá í tíðini var tað ikki loyvt donskum yrkisspælarum í øðrum londum (í heimligu kappingini varð sagt, at allir teir donsku spælararnir vóru amatørar) at vera við á landsliðnum. Erik Nielsen hevði spælt níggju landsdystir, áðrenn hann gjørdist yrkisspælari, og eftir heimkomuna var hann eina ferð á landsliðnum. 21. september í 1969 ella góð tvey ár eftir at hann hevði verið í Føroyum við Lübeck, var hann á danska landsliðnum, sum tapti 2–0 í Oslo.

Millum hinar Lübeck spælararnar í Føroyum var miðframherjin Waberski, sum segðist spæla á týskum unglingalandsliði, og so Boncke, sum segðist vera málverji á regiónsliðnum í økinum kring Lübeck.

Gerd Freier:

-Vit hildu Føroyar vera eitt stað í Eysturríki

Týski bilhandlarin hevur verið fleiri ferðir í Føroyum síðan 1967. Hann heldur at føroyska samfelagið hevur verið fyri einari stórari menning seinastu 30 árini. Eg minnist stóru náttúru økini, men hesi eru burtur í dag, sigur Gerd Freier, sum var við á ferðini hjá VFB Lubeck í 1967.

FØROYAFERÐ
Páll Holm Johannesen



Ein av leikararunum, sum vóru á liðnum hjá VFB Lubeck í 1967 í Føroyum, Gerd Freier, er í hesum døgum aftur í Føroyum í samband við landsdystin. Hann minnist væl frá ferðini í Føroyum í 1967.
Mynd: Jens Kr. Vang

Í samband við landsdystin ímóti Týsklandi, hevur fyritøkan P/F Wenzel forkunnuga vitjan í hesum døgum. Tað eru fýra bilhandlarar hjá Ford í Týsklandi, sum vitja føroysku fyritøkuna.

Ein teirra, Gerd Freier, var eisini í Føroyum fyri 36 árum síðan, tá VFB Lubeck spældi fýra dystir ímóti føroyingum. Hann starvast í dag sum bilhandlari í Luhnenburg, sum liggur 100 km sunnan fyri Lubeck.

Gerd Freier kom til Føroya mánadagin við Norrönu, sum jú er bygd í Lubeck. Hann spældi seinast í 60 árunum við týska felagnum VFB Lubeck.

Freier minnist væl ferðina í Føroyum í 1967. Hann sigur frá, at eingin á týska liðnum kendi nakað til Føroyar undan ferðini.

– Vit hildu at Føroyar verða eitt stað í Eysturríki, men tað funnu vit skjótt út av, at vit skuldu á eina longri ferð,enn til Eysturríkis. Føroyska landsliðið hevur gjørt nógv fyri vísa á Føroyar runt í heimi, og í dag vita flestu týskarar, hvar Føroyar liggja, greiðir Gerd Freier frá

Týskarin fortelur, at ferðalagið kom við Tjaldrinum til Føroya frá Keypmannahavn, og leikarar og venjarar gistu privat í Havn.

Minnist serliga landsdystin

Á ferðin leikti Lubeck fýra dystir, og serliga minnist Freier dystin ímóti landsliðnum. – Av dystunum vit leiktu, minnist eg serliga dystin ímóti føroyska landsliðnum, sum vit vunnu 4-0. Eg minnist serliga, tá týski tjóðsangurin var spældur, hvussu vánaligt tað ljóðaði, fortelur Freier skemtandi.

Aftaná dystin ímóti føroyska landsliðnum, var Lubeck ferðalagið bjóða í B36-húsið. Freier greiðir frá, at hann minnist hvussu gestablídnir føroyingar vóru, og at hansara viðleikarar vóru bergtiknir av, hvussu væl føroyingar dugdu at hugna sær.

Sjálvur spældi Freier sum yrkisleikari hálva tíð frá 1966 til 1971, og tey seinastu nógvu árini hevur hann arbeitt á fyritøku hjá Ford í Luhnenburg. Í arbeiðsørindum, hevur hann verið í Føroyum fleiri ferðir, síðan 1967.

– Í Føroyum er nógv broytt, síðan í 60 árunum. Eg hugsi sjálvsagt fyrst um bilarnar, men sjálvsagt eisini tey mongu bergholini og vegirnir, sum eru bygdir. Tá vóru stór vøkur grøn natt-úruøki, men hesi sær ein ikki longur, fortelur Freier at enda.